## Lukasz á blettinum

Tað verður lagt til merkis í Danmark, tá ið Brøndby vinnur á útivølli. Bæði í superliguni og í 2. deild eystur, har næstbesta liðið spælir, hevur stóri trupulleikin leingi verið úrtøkan á útivølli. Leygardagin eydnaðist tað næstbesta liðnum at vinna á útivølli fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum. Brøndby vitjaði B1908 á Amager, og Brøndby vann 6-1. Millum málskjúttarnar var Lukasz Cieslewicz. Hann hevur áður spælt við ungdómsliðunum hjá VB, og nú er hann eyðsýndur álopsspælari á næstbesta Brøndby liðnum.



## Alves slapp ongan veg

Brasilski fótbóltsspælarin Daniel Alves heldur fram í spanska felagnum Sevilla. Alves vildi sleppa til Chelsea at spæla, men Sevilla kravdi eina ovurhonds stóra upphædd fyri spælaran, og so var keypið av ongum. Alves hevur sjálvur hildið seg burtur frá Champions League dystum hjá Sevilla, tí so kundi hann spældi fyri annað felag í somu kapping, men nú lovar Alves, at hann ætlar at uppføra seg professionelt í Sevilla. Flytingarvindeygað læt aftur um vikuskiftið.

## Máttu ikki tapa

Hóast heimadystir í prinsippinum eiga at geva trý stig hjá einum oddaliði, so vóru runavíkingarnir ikki heilt ónøgdir sunnudagin.

- Sjálvandi vildu vit helst vinna. Men tá tað nú ikki gekk, so var javnleikurin sjálvandi tað næstbesta, heldur Óli Hansen, sum er liðformaður hjá NSÍ.

- Eg haldi eisini, at dysturin var merktur av, at hvørgin parturin vildi tapa. Teir koma á odda, men tíbetur megna vit alt fyri eitt at svara aftur. Og eftir steðgin eru báðir partar varnari.

Javnleikurin bar við sær, at EB/Streymur og HB enn eina ferð kundu minka um munin upp til oddin, men júst tey bæði liðini eru ikki tað, sum teir í NSÍ hugsa mest um.

- Sjálvandi er tað stuttligt, um kappingin verður meira spennandi. Og eg skilji eisini á lagnum, at alt fleiri eru farin at tosa um, hvørt tað skal eydnast teimum báðum liðunum at vinna seg heilt fram í oddin. Men hjá okkum er tað framvegis næsti dysturin, sum telur mest. Hesa ferð er tað móti EB/Streymi á útivølli, og tað er fyrst og fremst móti tí dystinum, at vit hava fokus, sigur Óli.

---

## Hópurin er sterkur

Jóhan V. Gunnarsson var aftur hesa ferð ein av mest eyðsýndu B36'arunum. Og eins og liðformaðurin hjá NSÍ, so heldur hann, at tað fyrst og fremst ráddi um, at dysturin ikki varð taptur.

- Sjálvandi fert tú altíð á vøllin fyri at vinna. Men ein javnleikur á útivølli móti hinum oddaliðnum er ok. Seinastu løtuna trýsta vit, og vit eru eisini um reppi at taka stigini, men teir høvdu eisini sínar møguleikar, so alt í alt mundi talan eisini vera um rættvíst úrslit, heldur hann.

Undan dystinum snúi nógv av prátinum seg um, at B36 mátti standa seg uttan teir tríggjar. Jákup Mikkelsen, Alex José dos Santos og Mikkjal Thomassen. Og at liðið kortini megnar javnleik í slíkum dysti heldur Jóhan undirstrikar breiddina, sum hópurin hevur.

- Tað haldi eg avgjørt. Tað nervaði ikki spælið hjá okkum tað heilt stóra, at tríggir somikið góðir spælarar eru uttanfyri. Og kortini høvdu vit eisini ein sterkan bonk, har menn sum Hanus og Oddmar koma inn. So eg haldi avgjørt, at vit hava neyðugu styrkina.

Og enn sum áður er tað so gullið, sum tit hugsa um.

- Ja, sjálvandi. Vit eru enn á odda, og so er tað sjálvandi tað, sum vit medda eftir, sigur hann.

NSÍ-B36 1-1 (1-1):

# Hondbremsan varð

**B36 var nøgt við støðuna, og NSÍ hevði ikki tyngdina, sum skuldi til fyri at bróta væl skipaða verjugarðin hjá gestunum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*Joannes@sosialurin.fo*

*NSÍ*

*B36*



Eingin fagnaður og heldur einki vónbrot. Soleiðis kendist tað, tá ið útnyrðingurin fyri fyrstu ferð seinnapartin sunnudagin gjørdi seg øgiligan og sendi kalt æl oman yvir fótbóltsvøllin við Løkin, har Eiler Rasmussen, sum kom væl frá uppgávuni, hevði bríkslað fyri síðstu ferð.

Í B36 leguni søgdu teir seg hava dyrgt eftir fullari úrtøku, men javnleikurin var at liva við. Í NSÍ hildu teir seg hava havt yvirvágina, sum kundi havt borið øll stigini við sær, men nú røður um at venda eygun ímóti næstu avbjóðingini á trongu leiðini í kappingini um FM heitið.

Hóast teir ikki fingu sigursmálið, tá ið teir síðstu løtuna høvdu avísa yvirvág, so var eingin ivi um, at tað vóru gestirnir, sum vóru meiri nøgdir. Tríggir leikbannaðir lyklaspælarar áttu ikki at borið bestu fyritreytirnar við sær. Tað sást væl úti á vøllinum, at Santos og Mikkjal Thomassen ikki vóru við, men tað bilti ikki.

Landsliðsmálverjin hevði sjálvandi pyntað millum stólparnar. Men 18 ára gamli unglingaspælarin, Jóan Pauli Jakobsen, var sannur brandur í B36 málinum. Hann livdi fullkomuliga upp til stóra álitið, sum Kurt Mørkøre hevði víst honum, og tað er einki at ivast í, at nógva venjingin saman við Jákupi Mikkelsen hevur ment unga mannin framúr nógv.

Beinanvegin sýndi Jóan Pauli meistarliga refleksbjarging, eftir at bólturin hevði broytt kós. NSÍ legði bragdliga fyri, og B36 lá aftarlaga, men málmøguleikarnir vóru fáir og smáir, og tá ið heimaliðið royndi at leggja høgar bóltar innfyri, var Jóan Pauli sannførandi, tá ið hann við stórum sjálvsáliti fór fram úr málinum.

### Hildu aftur

Tað var alla tíðina spennandi, men toppuppgerðin gjørdist ongantíð so intens og undirhaldandi, sum tað varð vónað. Báðir partar vístu, at teir dugdu væl at fara við bóltinum, og tað var støðugt samanspæl og ætlan við tí, sum gekk fyri seg, men tað vóru ikki nógvar spentar støður frammanfyri málini. Tað ráddi meiri um ikki at tapa enn at vinna. Hondbremsan varð ongantíð slept, og serliga hjá heimaliðnum var tað eyðsýnt, at tað restaði broddur og tyngd fyri at skapa tað, sum skuldi til fyri at fáa fulla úrtøku.

B36 gav tilvitað helvtina av vøllinum til heimaliðið, sentralu miðvallararnir Ingi Højsted og Klæmint Matras arbeiddu hart, og miðverjan var so væl skipað, sum úrslitini nógvu tær seinastu ferðirnar hava víst, at hon er.